

í tunlinum vóru teir seinastu metrarnir borðaðir



Krúnprinsaparið og Sofus Johannesen í túninum við Gjógv



Hesin vildi síggja tað, sum gekk fyri seg á bryggjuni í Fuglafirði

# dir jørð í Klaksvík

teimum, fóru krúnprinsaparið til Viðareiðis, meðan drotningin og prinsurin vitjaðu ymsastaði í Klaksvík. Tey løgdu millum annað leiðini fram við undirsjóvartunlinum, og har noyddust tey kongligu í bæði hjálm, vest og gummstivlar. Inni á botni í tunlinum greiddi stjórin fyri Norðoyatulinum frá um arbeiðið.

Á Viðareiði fingu krúnprinsparið eina hátíðarliga móttøku, og eftir at tey høvdu vitjað í kirkjuni og í prestagarðinum, dansaðu børn føroyskan dans fyri teimum í túninum frammanfyri gamla skúlan. Hetta var ein stór og hugtakandi løta.

Eftir at vitjanin í Norðoyggjum var av, fór kongsfamiljan í Eysturoynna á ferð. Har fóru tey fyrst til Fuglafirðar, og tey vitjaðu eisini í Leirvík, við Gjógv og í Elduvík.



Krúnprinsaparið vóru farin úr teimum fínu klæðunum og høvdu latið seg meira vanligt í, tá ið tey komu til Fuglafirðar



ð fløggum og kongakrúnum at taka ímóti kongaligu gestunum




Mary við favninum fullum av blómum. Drotningin segði á tíðindafundinum, at allar blómurnar, sum yvirlivdu dagin, vóru settar í vatn umborð á Danneborg